


# DÁTUEFTIRLITIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2007

# Innihald


1. Fororð . . . 3

2. Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan . . . 5
   2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini . . . 6
   2.2 Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum . . . 7
   2.3 Stovnurin umskipaður . . . 7
   2.4 Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum . . . 8
   2.4.1 Eftirlit og heimildir . . . 8

3. Virksemi í árinum 2007 . . . 9
   3.1 Hagtøl fyri 2007 . . . 11
   3.2 Munnligir fyrispurningar . . . 13
   3.3. Loyvir og fráboðanir . . . 14
   3.3.1 Loyvi til verkætlanir . . . 14
   3.3.2 Verkætlan – MARK . . . 14
   3.3.3 Verkætlan – At liva við krabbameini . . . 15
   3.3.4 Verkætlan – Nøgdsemiskanning í Heilsuverkinum . . . 15
   3.3.5 Verkætlan – Dálkingarevni í móðurlívi og heilsuárin sum eldri . . . 15
   3.3.6 Verkætlan – Foreldur at børnum við breki . . . 16
   3.3.7 Ílegusavnið (fráboðaðar granskingarverkætlanir) . . . 16
   3.4. KT-trygd . . . 17
   3.4.1 Trygdarkunngerðin . . . 17
   3.5. Hoyringar . . . 18
   3.5.1. Lógaruppskot . . . 18
   3.5.2. Kt-politikkur . . . 18

4. Ávís útvald mál í 2007 . . . 19
   4.1 Ymisk mál . . . 19
   4.1.1 Skráseting av starvsfólkum – internetnýtsla . . . 19
   4.1.2 Teldupostar og fílar hjá starvsfólkum . . . 20
   4.1.3 Persónstalið . . . 20
   4.1.4 Voice log . . . 20
   4.1.5 Internethandil . . . 20

4.1.6 Yrkisfelagsligt tilknýti . . . . . . . . . . 20
4.1.7 Myndir á heimasíðu . . . . . . . . . . 21
4.1.8 Sjónbandaupptøkur av børnum í fólkaskúlanum . . . . . . . . . . 21
4.1.9 RKI skráseting . . . . . . . . . . 22
4.1.10 Ættarbandsskrá yvir fólkið í Føroyum . . . . . . . . . . 22
4.1.11 Bíðilisti á internetið . . . . . . . . . . 23
4.2 Mál tikin upp av egnum ávum . . . . . . . . . . 25
4.2.1 Ikki fráboðað vakmyndatól 2x3 . . . . . . . . . . 25
4.2.2 Intrum Justitia . . . . . . . . . . 25
4.2.3 Gjaldstovan . . . . . . . . . . 26

5. Altjóða samstarv . . . . . . . . . . 27
5.1 Norðurlond . . . . . . . . . . 27

6. Eftirlitsvitjanir í 2007 . . . . . . . . . . 29

Skjal 1: Reglugerð fyri Dáturáðið . . . . . . . . . . 31
Skjal 2: Vegleiðing um vakmyndatól . . . . . . . . . . 33
Skjal 3: Vegleiðing um heimaarbeiðspláss . . . . . . . . . . 35

Ársfrágreiðingin 2007 hjá Dátueftirlitinum
Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent

# 1 Fororð

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2007.

Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2007. Dátueftirlitið varð í 2007 umskipað og styrkt, eftir at stovnurin meginpartin av 2006 hevði verið uttan starvsfólk í føstum starvi.

Dátueftirlitið setti í 2007 tey ungu í miðdepilin við bóklinginum ***Tað er tín avgerð***. Í bóklinginum verður fokus sett á evnið ung og nýtsla av elektroniskum samskiftismiðlum. Bóklingurin vendir sær til børn og ung og tey, sum varða av teimum og viðger ymisk evni, sum knýta seg til ung og internet- og fartelefonnýtslu teirra.

Í juli 2007 komu í gildi nýggjar reglur um, at øll vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirlitinum. Í hesum sambandi gjørdi Dátueftirlitið eina vegleiðing í 5 punktum um nýtslu av vakmyndatólum, og vórðu fráboðanarskjøl tilevnað serliga til hetta økið. Rættiliga nógv orka er brúkt til at viðgera fráboðanir um vakmyndatól og at svara fyrispurningum um vakmyndatól yvirhøvur.

Eins og undanfarna ár hevur eitt ávíst arbeiði verið í samband við 3. lands góðkenning frá ES. Dátueftirlitið tók í 2005 stig til at fáa ES at viðgera og góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Arbeiðið er enn ikki liðugt, og í 2007 hevur verið samskifti við ES- nevndina um spurningar, sum hava stungið seg upp hesum viðvíkjandi, umframt at Dátueftirlitið eisini hevur luttikið á fundi í Brussels.

Dátueftirlitið luttók somuleiðis á árliga felags norðurlendska málsviðgerafundinum, sum í 2007 var hildin í Bergen.

Tórshavn, 18 desember 2008

Turið Debes Hentze
Forkvinna í Dáturáðnum

Ingunn Eiriksdóttir
Stjóri í Dátueftirlitinum

# 2 Dátueftirlitið, ráðið og skrivstovan

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært lógini eru fyrisitingarliga endaligar.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýrismanninum í lógarmálum, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár, og heimild er í lógini at velja eykalimir, men henda heimild hevur ikki verið brúkt higartil.

LIMIRNIR Í DÁTURÁÐNUM
PR. 31. DESEMBER 2007:
Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna
Bjarni Wilhelm, fyrisitingarleiðari
Óli Hansen, løgfrøðingur

SKRIVSTOVAN:
1. januar 2007 varð stovnurin umskipaður. Settur var ein stjóri, ein løgfrøðingur og ein skrivari.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum, bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2007 var: **kr. 1.701.000 kr.**

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2003-2007.

## FÍGGJARJÁTTANIN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM FYRI 2003-2007

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| | **J** | **J** | **J** | **J+EYJ** | **J** |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **1.006** | **912** | **912** | **1.262** | **1.707** |
| Lønir o.a. | 662 | 650 | 694 | 1.000 | 1.400 |
| Keyp av vørum og tænastum | 160 | 126 | 126 | 126 | 168 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 148 | 100 | 74 | 100 | 102 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 36 | 36 | 18 | 36 | 37 |

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2007 vóru hesar reglur galdandi:**
Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).

Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).

Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 70 frá 2. juli 2007.

Kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Kunngerð nr. 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 72 frá 2. juli 2007.
Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.

Innanhýsis roknskaparreglugerð (send til góðkenningar hjá Innlendismálaráðnum)

## 2.3. STOVNURIN VAR 1. JANUAR 2007 UMSKIPAÐUR

Dátueftirlitð var sett á stovn 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Ein stóran part av tíðini var eitt starvsfólk í starvi á Dátueftirlitinum, eitt skifti tvey starvsfólk og Ráðið virkaði sum leiðsla fyri stovnin. Tað vísti seg, at henda skipan var ikki nøktandi, og tí var gjørt av at umskipa stovnin. Játtanin á fíggjarlógini var hækkað og avgjørt varð, at skuldi stovnurin virka eftir ætlan, var neyðugt við í minsta lagi 2 ½ starvsfólkum. Ein stjóri var settur 1. januar 2007, og 1. apríl 2007 var Dátueftirlitið fullmannað við 2 løgfrøðingum og einum skrivstovufólki, sum starvaðist hálva tíð.

Stórur partur av orkuni hjá Dátueftirlitinum fyrstu tíðina fór við at skipa stovnin innanhýsis. Nýggj reglugerð var gjørd fyri Dáturáðið, har m.a. arbeiðsbýtið millum ráð og skrivstovu var ásett. Nýggja reglugerðin kom í gildi 14. juni 2007 (skjal 1). Uppskot til nýggja innanhýsis roknskaparreglugerð var somuleiðis gjørt í 2007 og var sent Innlendismálaráðnum til góðkenningar.

Nýggjar mannagongdir fyri skráseting av manuellum og elektroniskum málum vóru gjørdar og Dátueftirlitið fekk nýggja heimasíðu. Nýggj fráboðanarbløð vóru gjørd, og møguleiki var nú at senda Dátueftirlitinum fráboðan ella umsókn um loyvi umvegis heimasíðuna.

Dátueftirlitð fekk í 2007 nýtt búmerki. Búmerkið hava Sansir sniðgivið, og hugskotið handan búmerkið snýr seg um vernd og samleika hjá tí einstaka. Støðið fyri skapið er eitt fingramerki í einum

sirkli, sum hevur skap av einum verndarskjóli. Skapið kann eisini geva eina mynd av einstaka menniskjanum, sum verður vart av fleiri løgum.

## 2.4. UPPGÁVURNAR HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

### 2.4.1. EFTIRLIT OG HEIMILDIR

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

# 3 Virksemi í árinum 2007

Dátueftirlitið hevur í 2007 m.a. viðgjørt hesi mál:

- viðgjørt loyvir
- viðgjørt fráboðanir
- ummælt nýggja lóggávu
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt klagur frá persónum um ymiska viðgerð av persónsupplýsingum
- tikið mál upp av egnum ávum
- luttikið í norðurlendskum samstarvi
- samskift við ES myndugleikar í samband við 3. lands góðkenningina
- gjørt vegleiðing um heimaarbeiðspláss
- gjørt vegleiðing um vakmyndatól
- gjørt bókling um ung og elektroniskar samskiftismiðlar

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og fjøltáttaðar. Málsviðgerðin í Dátueftirlitinum fevnir m.a. um viðgerð av loyvum og fráboðanum, at ummæla nýggja lóggávu og munnliga og skrivliga vegleiðing, so virkað verður fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði. Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar kunnu m.a. verða um, hvørt upplýsingar kunnu metast sum viðkvæmar, og um ávísar viðgerðir av persónsupplýsingum kunnu metast at fylgja reglunum í persónsupplýsingarlógini. Í 2007 hava nógvir fyrispurningar verið um vakmyndatól, um telefonskráseting, um viðurskiftini millum arbeiðsgevarar og starvsfólk í samband við nýtslu av elektroniskum samskiftismiðlum, og nógvir fyrispurningar hava eisini hetta árið verið um p-talið.

INNSATSØKI

**Bóklingur**
Dáueftirlitið hevur gjørt ein bókling, har fokus varð sett á ung og samskiftismiðlar. Bóklingurin hevur heitið „Tað er tín avgerð" og er serliga ætlaður skúlanæmingum í framhaldsdeildunum. Á ein lættlesiligan hátt verður í bóklinginum greitt frá, hvussu persónsupplýsingar kunnu koma á skeivar hendur og verða brúktar á óhepnan hátt, og hvussu til ber at verja hesar upplýsingar.

Endamálið við bóklinginum er at læra tey ungu at taka avgerðir, sum eru rættar fyri tey, og víst verður m.a. á, at tað er teirra avgerð, hvat tey til dømis skriva í kjattinum, hvat tey leggja út á internetið, hvat tey skriva í sms'inum ella hvørjar myndir o.a tilfar, tey senda víðari til vinfólkini.

Evnini, sum verða viðgjørd, eru t.d. at eingin er anonymur á internetinum – tá vit ferðast á internetinum lata vit nógv spor eftir okkum, sum onnur kunnu hava áhuga í. Eitt annað evni snýr

seg um happing umvegis fartelefon og internet, har ið áherðsla verður løgd á, at tey ungu skulu hugsa seg væl um, og at ein tummilfingraregla kann vera, at tað sum ein ikki ger í tí veruliga lívinum, eigur ein heldur ikki at gera í talgilda rúminum. Vakmyndatól verða eisini umrødd í bóklinginum, har spurnartekin verður sett við, um samfelagið gerst tryggari við alt fleiri vakmyndatólum.

Bóklingurin er uppbygdur soleiðis, at hvørt evni er býtt upp í tríggjar partar, við fakta, ymiskum dømum úr veruliga lívinum og uppgávum – har tey ungu hava møguleika at arbeiða víðari við evnunum.

Í 2008 fer Dátueftirlitið út á allar skúlar í Føroyum, sum hava framhaldsdeild, at greiða næmingum frá bóklinginum. Eisini er ætlanin at vitja miðnámsskúlarnar og greiða frá evnunum í bóklinginum.

**Vakmyndatól**

Dátueftirlitið gjørdi av, at í 2007 skuldi fokus setast á økið vakmyndatól.

Tann 2. juli 2007 komu nýggjar reglur í gildi, við tað at broytingar vóru gjørdar í tríggjar kunngerðir um fráboðanarskyldu. Hesar nýggju reglur hava við sær, at øll vakmyndatól nú skulu fráboðast Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið má ásanna, at alt fleiri vakmyndatól verða sett upp í londunum rundan um okkum og við broytingini í reglunum er nú eisini møguligt at fáa hagtøl yvir, hvussu støðan er í Føroyum á hesum øki.

Nógv orka er farin við at viðgera fráboðanir um vakmyndatól og at svara fyrispurningum um vakmyndatól frá bæði almennum og privatum.

Dátueftirlitið gjørdi í hesum sambandi eina vegleiðing um nýtslu av vakmyndatólum við heitinum „Hetta eigur tú at hugsa um áðrenn tú setur upp vakmyndatól", (sí skjal 2). Vegleiðingin er í hesum 5 punktum:

1. Er veruliga neyðugt við eftirliti?
2. Hevur tú hugsa um aðrar møguleikar?
3. Er tað loyvt at hava eftirlit við økinum við vakmyndatóli?
4. Kennir tú tínar skyldur tá ið tú hevur eftirlit?
5. Brúkar tú minst víðfevnandi hátt at hava eftirlit?

Nýtt fráboðanarskjal til vakmyndatólsøkið er eisini gjørt og lagt út á heimasíðuna, soleiðis at fráboðanin kann útfyllast og sendast Dátueftirlitinum umvegis internetið.

**Vegleiðing um heimaarbeiðspláss**

Dátueftirlitið fær støðugt fyrispurningar um kt-trygd og ofta snýr tað seg um trygd í samband við heimaarbeiðspláss. Tað er eftirhondini rættiliga vanligt, at starvsfólk av og á arbeiða heimanífrá. Tað er rættliga ymiskt, hvussu hetta er skipað, og hvat starvsfólkini hava atgongd til, men Dátueftirlitið metir tó, at nøkur felags eyðkenni eru fyri heimaarbeiðspláss.

Á einum vanligum arbeiðsplássi hava starvsfólkini ofta ígjøgnum langa tíð arbeitt upp siðvenjur og mannagongdir, sum tryggja álítandi viðgerð av upplýsingum. Tá arbeitt verður frá einum heimaarbeiðsplássi, eru siðbundnar mannagongdir ofta ikki til staðar, og Dátueftirlitið metir tað hava stóran týdning, at arbeiðsgevarar gera leiðbeinandi reglur fyri nýtsluni av heimaarbeiðsplássum. Dátueftirlitið hevur tí í 2007 gjørt eina vegleiðing

MYND 1: Bólking av málum í 2007




um heimaarbeiðspláss (skjal 3), vegleiðingin er at finna á heimasíðuni www.datueftirlitid.fo.

3.1. HAGTØL FYRI 2007

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í skjalaskránni hjá Dátueftirlitinum fyri 2007, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2007.

Í tíðarskeiðinum 1. janauar til 31. desember 2007 vóru 113 nýggj mál skrásett, og hetta er ein vøkstur uppá 31% í mun til undanfarna ár.

Á mynd 1. omanfyri sæst, hvussu tey nýstovnaðu málini í 2007 kunnu bólkast.

Málini kunnu í høvuðsheitum bólkast á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Fráboðanir og givin loyvir | 34 |
| Norðurlendskt og Altjóða samstarv | 1 |
| Fyrispurningar frá almennum myndugleikum og privatum | 23 |
| Lógaruppskot til hoyringar | 7 |
| Mál tikin upp av egnum ávum | 2 |
| Mál viðvíkjandi kt-trygd | 2 |
| Onnur mál | 44 |

Á mynd 2 á síðu 12 sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar, málini snúgva seg um.

Málini eru í høvuðsheitum uppbýtt á henda hátt

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 36% |
| Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 23% |
| Privatpersónar | 7% |
| Kommunur | 2% |
| Annað | 32% |

**MYND 2: Málsbýtið í mun til myndugleikar, stovnar o.t.**




**MYND 3: Málsbýti í mun til evnisbólkar**




Á mynd 3 sæst hvussu málini eru býtt upp á ymsu evnisbólkarnar.

Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar í %

| | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 15% |
| Gransking | 11,5% |
| Starvsfólkaviðurskifti | 9% |
| Kt-trygd | 8% |
| Innlit | 3,5% |
| Ummæli/hoyring | 10,6% |
| Annað | 42,4% |

**MYND 4: Munnligir fyrispurningar.**
**Málsbýtið í mun til myndugleikar, stovnar o.t.**



3.2. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR:

Sum nakað nýtt byrjaði Dátueftirlitið í 2007 at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vóru avgreiddir umvegis telefon. Í hesum bólki eru skrásettir fyrispurningar, har borgari ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í samband við verandi ella komandi mál.

Á mynd 4 á síðu 12 sæst hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2007, kunnu bólkast.

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 33% |
| Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 27% |
| Privatpersónar | 26% |
| Kommunur | 4,5% |
| Advokatar | 9,5% |

**Almennir myndugleikar**
**(almennir myndugleikar og stovnar o.l.)**

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, og nær tað er loyvt at lata víðari persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Eins og undanfarnu árini hava fyrispurningar verið um p-talið, eisini hava fyrispurningar verið um samkoyring av upplýsingum, um innlit, um reglurnar fyri heimaarbeiðspláss, elektroniska avrokning, voice log og ymisk starvsfólkamál. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkamál hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar úr teldupostskipanini hjá starvsfólki ella aðrar loggupplýsingar um starvsfólk.

**Fyritøkur**
**(privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.)**

Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum og arbeiðsgevarum hava í 2007 snúð seg um viðgerð av persónsupplýsingum í ymiskum starvsfólkaviðurskiftum. Herundir um at eftirkanna heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, um innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, um skráseting av telefonsamskifti, um at lata víðari kundaupplýsingar, um kryptering av upplýsingum á netinum, um skráseting í RKI, p-tøl, at lata víðari upplýsingar frá ítróttarfeløgum, og at lata víðari ymiskar limalistar. Eisini hava onkrir fyrispurningar verið um, hvussu reglurnar eru um handfaring av upplýsingum o.ø. í teldupostskipanunum, eftir at starvsfolk eru farin úr starvinum.

**Privatpersónar**

Rættiliga nógvir av fyrispuringunum frá privatpersónum hava verið frá starvsfólkum, sum hava spurt um reglur fyri, nær ein arbeiðsgevari kann kanna teldupost og heimasíðunýtslu hjá starvsfólki. Eisini hava onkrir fyrispurningar verið frá starvsfólki, sum eru søgd úr starvi, og sum vilja vita, hvussu arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. Fyrispurningar hava verið um skráseting av persónsupplýsingum í samband við høvuðsuppgávu ella phd-lestur, um happing á internetinum, um skráseting av upplýsingum í ARTO, um p-talið, um skráseting í RKI og um ólógliga downloading av internetinum.

**Kommunur**

Fyrispurningarnir frá kommununum hava hetta árlið serliga verið um í ymiskum førum at lata

víðari persónsupplýsingar til privat ella at leggja á internetið, um kt-trygd og um vakmyndatól.

**Advokatar**

Fyrispurningarnir frá advokatum hava í 2007 serliga verið um ymiska viðgerð av persónsupplýsingum í starvsfólkamálum, herundir serliga um í hvønn mun arbeiðsgevarar kunnu fáa innlit í teldupostasamskifti hjá starvsfólkum og upplýsingar um starvsfólk í lyklaskipanum, men spurningar hava eisini verið um nýtslu av p-talinum og um kt-trygd.

3.3. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

**Viðgerðarloyvi:**

Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvi eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

FRÁBOÐAN:

Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Tríggjar kunngerðir eru gjørdar við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum ikki eru viðkvæmar, verða viðgjørdar skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um vakmyndatól ella um at flyta persónsupplýsingar av landinum.

3.3.1. LOYVI TIL VERKÆTLANIR

Dátueftirlitið hevur í 2007 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

3.3.2. VERKÆTLAN:

**MARK (Matur, alkohol, royking og kostur)**
Dátuábyrgdari: DFAA (Pál Weihe)

Endamál:

Endamálið við verkætlanini er at kanna heilsustøðuna hjá 2000 tilvildarliga útvaldum føroyingum

millum 40 og 70 ár. Upplýsingar um navngivnar persónar skulu goymast, so at tað ber til at venda aftur til teirra nøkur ár seinni og kanna broytingar í heilsustøðuni og kanna týdningin av lívsstílinum.

Háttur:
Upplýsingarnar skulu fáast til vega við samtykki frá skrásetta og skulu nýtast í omanfyri nevndu verkætlan, har tær skulu knýtast at upplýsingum um m.a heilsustøðu og onnur heilt privat viðurskifti.

Góðkenning:
Vísindasiðsemisnevndin hevur tann 7. desember 2007 góðkent verkætlanina.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi var givið tann 11. desember 2007 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 31. desember 2010, tá tað skal endurskoðast.

3.3.3. VERKÆTLAN:

**At liva við krabbameini**
Dátuábyrgdari:
Føroya Felag móti Krabbameini (Jákup Olsen)

Endamál:
Verkætlanin „At liva við krabbameini" er ein kanning av, hvussu krabbamein kann broyta lívið hjá sjúklingum og avvarðandi. Verkætlanin verður gjørd í trimum umførum. Fyrsta umfar er ein sjalvstøðug verkætlan og støða verður tikin til, um annað og triðja umfar skulu gerast, eftir at fyrsta umfar er eftirmett.

Háttur:
Upplýsingarnar skulu fáast til vega við samtykki frá skrásetta.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi var givið tann 6. mars 2007 við ávísum treytum og var upprunaliga galdandi til 1. januar 2008, men var síðani longt til 31. desember 2008.

3.3.4. VERKÆTLAN:

**Nøgdsemiskanning í heilsuverkinum**
Dátuábyrgdari:
Almanna- og Heilsumálaráðið (Poul Geert Hansen)

Endamál:
Verkætlanin fevnir um eina kanning millum 1000 sjúklingar, sum eru útskrivaðir frá teimum trimum føroysku sjúkrahúsunum.

Háttur:
Kanningin verður gjørd við spurnarbløðum og við samtykki frá skrásetta. Kanningin er navnloynd.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi var givið tann 9. mars 2007 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 31. desember 2007.

3.3.5. VERKÆTLAN:

**Dálkingarevni í móðurlívi og heilsuárin sum eldri**
Dátuábyrgdari: DFAA (Pál Weihe)

Endamál:
Endamálið við verkætlanini er at kanna, um útsetilsi í viðgongutíðini fyri dálkandi evni í matinum hevur við sær negativ árin á miðalnervalagið og hjarta-æðralagið. Kanningin fevnir um fólk fødd í Føroyum í 1934-1937,

Háttur:
Kanningin verður skipað sum klinisk kanning, biologisk kanning, neuro-psykologiskar kanningar, neuro fysiologiskar kanningar, og spurnarblaðskanningar. Upplýsingarnar skulu fáast til vega frá Landsfólkayvirlitinum og nýtast í omanfyri nevndu verkætlan, og skulu knýtast at upplýsingum um m.a heilsustøðu.

Góðkenning:
Vísindasiðsemisnevndin hevur tann 16. februar 2007 góðkent verkætlanina í tíðarskeiðnum 1. apríl 2007 til 31. desember 2009

Vigerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi var givið tann 2. mars 2007 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 31. desember 2009

3.3.6. VERKÆTLAN:

**Kanning: Foreldur at børnum við breki**
Dátuábyrgdari: Gyðja Johannesen

Endamál:
Kanningin verður gjørd í sambandi við bachelor uppgávu á Kennaraháskóla Íslands. Heitið á verkætlanini er, foreldur at børnum við breki.

Háttur:
Kanningin verður gjørd við spurnarbløðum og samrøðum og við samtykki frá skrásetta.

Viðgerðarloyvi:
Viðgerðarloyvi var givið tann 31. januar 2007 við ávísum treytum.

Tann 21. september 2007 fekk Dátueftirlitið fráboðan um, at kanningin var liðug, og at persónsupplýsingarnar vóru burturbeindar.

Dátueftirlitið hevur í 2007 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Nevnast kunnu m.a. tvær kanningar hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning:

- Happing í føroyska fólkaskúlanum, og
- Spurnarblað um mál.

3.3.7. ÍLEGUSAVNIÐ (FRÁBOÐAÐAR GRANSKINGARVERKÆTLANIR)
Ílegusavnið var sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin) og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Dátureftirlitið metir, at heimildin hjá Ílegusavninum í §§ 3-5 og 7 í Ílegulógini til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar eisini fevnir um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í ítøkiligu verkætlanunum.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar krevst

onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi og hevur hetta við sær, at loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum til ítøkiligu verkætlanirnar hjá Ílegusavninum, men at hesar tó skulu fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið hevur uppá ítøkiligan fyrispurning svarað Ílegusavninum, at mett verður ikki, at tað ber til at gera eina fráboðan, sum fevnir um bæði generellu skipanina og verkætlanir sum heild, orsakað av at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingarlógini. Verkætlanirnar skulu sostatt fráboðast Dátueftirlitnum í hvørjum einstøkum føri.

Í 2007 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:

- Verkætlan viðv. skráseting av diagnosum innan krabbamein
- Forkanningarverkætlan um skráseting av patologidiagnosum
- Autismuverkætlan
- Verkætlan innan 4 psykiskar sjúkur
- Forkanningarverkætlan innan blóðkrabbaøkið
- Granskingarverkætlan innan eygnaøkið

### 3.4. KT-TRYGD

Ein meginregla í dátuverndarrættinum er trygdarkravið. Hetta merkir í høvuðsheitum, at bert góðkendir persónar, skulu hava atgongd til góðkend endamál.

#### 3.4.1. TRYGDARKUNNGERÐIN

Reglur eru um kt-trygd í § 31 í persónsupplýsingarlógini, og í 2003 var kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum lýst. Kunngerðin verður vanliga nevnd Trygdarkunngerðin, og í kunngerðini eru nágreiniligar ásetingar um kt-trygd.

Reglurnar áseta í høvuðsheitum, at dátuábyrgdarar skulu skipa fyri innaneftirliti og hava skipaða fysiska, elektroniska og fyriskipanarliga trygd. Freistin fyri at lúka krøvini í Trygdarkunngerðini var úti í 2006, men tað tykist sum um tað gongur striltið við at fáa myndugleikar og virkir at halda hesar reglur. Landsgrannskoðarin hevur somuleiðis fleiri ferðir víst á, at tørvur er á at betra um kt-trygdina í tí almenna.

Dátueftirlitið samskiftir javnan við bæði almennar myndugleikar og privat virkir um kt-trygd, og ásannast má, at enn er langt eftir á mál. Dátueftirlitið kemur ofta í samband við myndugleikar, tá nýggjar skipanir skulu takast í nýtslu, og í hesum sambandi kann staðfestast, at dentur ofta verður lagdur á, at nýggju skipanirnar skulu økja um produktivitetin og effektivitetin, meðan trygdin ikki verður raðfest nóg ovarlaga.

Reglur um kt-trygd snúgva seg í stóran mun um at seta mál, skjalfesta og eftirmeta. Vanliga verður sagt, at 80% av krøvunum í kt-trygdarskipanum eru fyriskipanarlig, meðan 20% av krøvunum eru teknisk. Hetta hevur við sær, at arbeiðið við kt-trygd í stóran mun snýr seg um at gera ítøkiligar mannagongdir, vegleiðingar og skjalfestingar og hetta er tíðarkrevjandi arbeiði og krevur nógva upplæring, og leiðslurnar hava møguliga ilt við at síggja ágóðan av hesum arbeiðinum beinanvegin, og tí verður tað raðfest aftur um aðrar uppgávur.

Ofta er tað so at virusverjur, og verjur móti teldusníkum o.ø. er í lagi, meðan verri stendur til við fyriskipanarligu trygdini, og í onkrum føri fysisku trygdini eisini.

Tað er dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av, at reglurnar í trygdarkunngerðini verða fylgdar, og at starvsfólkini fáa upplæring, kunning og vegleiðing í trygdarreglunum.

## 3.5. HOYRINGAR

### 3.5.1. LÓGARUPPSKOT

Dátueftirlitið hevur í árinum ummælt hesi lógaruppskot:

- Lov om ændring af lov om videreanvendelse af den offentlige sektors informationer
- Lov for visse udlændinges opholdstilladelse med henblik på beskæftigelse på Færøerne
- Uppskot til løgtingslóg um útleigan av bústaðum (leigulógin)
- Uppskot til løgtingsóg um marknaðarføring
- Lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme

### 3.5.2. KT-POLITIKKUR

Fleiri almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við kt-trygd og kt-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í 2007 ummælt kt-politikk hjá hesum almennu myndugleikum:

- Rúsdrekkasølu Landsins
- Fiskimálaráðnum

Somuleiðis er trygdarhondbók fyri Landsnet sent Dátueftirlitinum, og fleiri stovnar hava eins og undanfarna ár sent Dátueftirlitnum avtalu um Landsnet sum dátuviðgera til hoyringar.

# 4. Ávís útvald mál í 2007

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verður greitt nærri frá einstøkum útvaldum málum í 2007.

## 4.1. YMISK MÁL

### 4.1.1. SKRÁSETING AV STARVSFÓLKUM INTERNETNÝTSLA

Í 2007 eru nakrir fyrispurningar komnir frá privatum fyritøkum um, hvørjar reglur eru galdandi um arbeiðsgevari ynskir at halda eyga við, hvar arbeiðstakarin ferðast á internetinum.

Dátueftirlitið hevur í seinastuni merkt ein øktan áhuga fyri hesum spurningum, og hevur í hesum sambandi lagt ymiskt kunnandi tilfar um evnið á heimasíðuna.

Rættarstøðan er í høvuðsheitum tann, at øll upplýsingarkervi skráseta sjálvvirkandi, hvør loggar seg inn, og hvør loggar seg út. Arbeiðsgevarin hevur skyldu til at logga allar rørslur í upplýsingarkervinum, sum hava týdning fyri upplýsingartrygdina. Loggingin er harumframt neyðug fyri, at kervið skal virka. Serliga ber hetta í sær eina skyldu at logga nýtslu hjá skrásettum og royndir hjá óskrásettum at nýta kervið.

Dátueftirlitið mælir til, at arbeiðspláss hava reglur fyri at nýta upplýsingarkervið. Starvsfólkini eiga at verða kunnað um hesar reglur og avleiðingarnar av at bróta tær. Tað er ikki uppgávan hjá Dátueftirlitinum at gera av, hvørjar fylgjur brot á tílíkar reglur eiga at fáa fyri starvsfólkini.

Um arbeiðsgevarin gerst varugur við, at upplýsingarkervið verður misnýtt, kann hann geva boð um, at eftirlit verður framt við, hvør misnýtir upplýsingarkervið, um hetta ikki heldur uppat innan eina ávísa freist. Um misnýtslan ikki er hildin uppat innan givnu freistina, kann arbeiðsgevarin uttan loyvi frá starvsfólkunum, gjøgnum loggin finna út av, hvør stendur aftanfyri. Í tílíkum føri er tað ein fyritreyt, at boðini/kunningin frá arbeiðsgevaranum eru komin til starvsfólkini í góðari tíð.

Persónsverndin hjá starvsfólkunum kemur tá at viga minni enn grundaði áhugin hjá arbeiðsgevaranum í eftirlitinum. Upplýsingarnar, sum koma fram, kunnu møguliga verða brúktar móti starvsfólkunum t.d. í einum arbeiðsrættarmáli. Í tílíkum førum eru aðrar reglur galdandi enn persónsupplýsingarlógin.

Um loggurin bendir á revsiverd viðurskifti, t.d. róður á alnótini eftir barnaporno, skal løgreglan altíð verða varskógvað. Arbeiðsgevarin kann ikki av sínum eintingum kanna, hvussu nógva tíð hvør einstakur brúkar á alnótini, ella hvørjar síður verða vitjaðar.

4.1.2. TELDUPOSTAR OG FÍLAR HJÁ STARVSFÓLKUM

Arbeiðsgevarin hevur sum meginreglu ikki rætt til at lesa privatan teldupost og fílur (t.d. føðingardagsheilsanir, privat brøv ella tílíkt) hóast hetta liggur á teldukervinum hjá arbeiðsgevaranum.

Tá talan er um at lesa teldupostar og fílur, sum hava samband við arbeiðið (brøv, fyrispurningar, bíleggingar o.t.), hevur arbeiðsgevarin í nøkrum førum rætt til at kanna hesar, eisini tá teldupostarnir og fílurnar liggja á telduni ella í postkassanum hjá starvsfólkunum. Í hvørjum førum og eftir hvørjum treytum hetta ber til, má metast um í hvørjum einstøkum føri við atliti at reglunum í § 9, stk. 1, nr. 6.

4.1.3. PERSÓNSTALIÐ

Eins og árini frammanundan hevur Dátueftirlitið í 2007 fingið fleiri fyrispurningar um nýtslu av p-talinum. Tað tykist sum um hetta framhaldandi er ein spurningur, sum hevur stóran áhuga, hóast reglurnar í persónsupplýsingarlógini eru sera greiðar á hesum øki.

4.1.4. VOICE LOG

Dátueftirlitið fekk í 2007 fleiri fyrispurningar um „voice log" sum er eitt slag av bandaðum telefonsamrøðum. Dátueftirlitið viðgjørdi somuleiðis eitt ítøkiligt mál um voice log, har spurningurin var, í hvønn mun voice loggurin kundi nýtast í sambandi við disiplinær ella uppsagnar mál móti starvsfólkum, sum møguliga ikki høvdu borið seg rætt at.

4.1.5.INTERNETHANDIL

Eitt loyvi var givið til ein internethandil at skráseta persónsupplýsingar í samband við handilsligt virksemi á internetinum.

4.1.6. YRKISFELAGSLIGT TILKNÝTI

Upplýsingar um yrkisfelagsligt tilknýti eru sambært § 2 í persónsupplýsingarlógini viðkvæmar og eru sostatt undir skerpaðum viðgerðarkrøvum.

Fyrispurningurin snúði seg um, hvørt Yrkisdepilin kundi útvega yrkisfeløgum eitt yvirlit yvir teir lærlingar, ið gera lærusáttmála. Yvirlitið skuldi síðani bólkast millum yrkisfeløgini, alt eftir hvørjum lønarsáttmála, lærlingurin varð løntur eftir. Hetta fyri at yrkisfeløgini kundu senda lærlingunum bræv, har tey bjóðaðu teimum at gerast limir.

Niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum í hesum máli var *„at Yrkisdepilin ikki, uttan samtykki, hevur loyvi at útvega yrkisfeløgunum eitt yvirlit yvir lærlingar, har allir, ella ein partur, ikki eru limur í yrkisfelag. Tó kunnu upplýsingarnar víðarigevast uttan samtykki, um hetta er avtalað í einum lønarsáttmála ella líknandi."*

Somuleiðis var í einum seinni fyrispurningi spurt, um Yrkisdepilin kundi útflyggja navn á einum lærupláss til eitt yrkisfelag, tá viðkomandi lærupláss hevur sett ein lærling í starv.

Dátueftirlitið metti tað vera ivasamt, um hetta beinleiðis var í stríð við reglurnar í persónsupplýsingarlógini, men metti tað vera sannlíkt, at hetta var ein roynd at umganga reglurnar í lógini og fyrru niðurstøðuna frá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið vísti í hesum sambandi á aðra loysn, sum eisini var umrødd í fyrru avgerðini hjá

Dátueftirlitium um at *„ein annar møguleiki kundi í staðin verið, at Yrkisfelagið gjørdi lærlingarnar varugar við, at teir ikki automatiskt gerast limir í yrkisfelag, tá teir gera lærusáttmála. Í tí sambandi kann Yrkisfelagið heita á lærlingarnar um at venda sær til viðkomandi yrkisfelag um teir ynskja at gerast limir.“*

4.1.7. MYNDIR Á HEIMASÍÐU

Eitt føroyskt fimleikafelag vendi sær til Dátueftirlitið fyri at gera vart við, at ein føroyskt heimasíða endurgav myndir frá felagsins heimasíðu á ein bæði særandi og villeiðandi hátt. Millum annað hevði heimasíðan nærmyndir av ávísum kropslutum hjá íðkandi fimleikarum. Eftir at gjørt var vart við hetta, vórðu myndirnar tiknar av heimasíðuni.

4.1.8. SJÓNBANDAUPPTØKUR AV BØRNUM Í FÓLKASKÚLANUM

Ein fyrispurningur var frá foreldraumboði í einum skúlastýri, sum ynskti at fáa at vita, hvørjar reglur og leiðbeiningar eru galdandi fyri sjónbandaupptøkur av børnum í skúlunum. Orsøkin til fyrispurningin var, at foreldur at børnum í nøkrum 1. og 2. flokkum vóru ivasom, tí at børn teirra vóru komin heim og høvdu greitt frá, at ein „fremmandur“ hevði gjørt sjónbandaupptøkur av teimum í skúlanum. Tá málið varð kannað hjá viðkomandi skúla, vísti tað seg, at tað snúði seg um upptøku av næmingum, ið høvdu trupulleikar av onkrum slag, og upptøkurnar skuldu brúkast til analysu saman við serlærara, fyri at koma við tilboði til hesar næmingar. Foreldrini at næmingunum við trupulleikum vóru kunnað frammanundan, men foreldrini at hinum børnunum í flokkinum vóru ikki kunnað.

Dátueftirlitið svaraði m.a. : *„Sjónbandaupptøkur av persónum eru persónsupplýsingar og eru tískil fevndar av Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.*

*Persónsupplýsingarlógin ásetur einki ítøkiligt um sjónbandaupptøkur, men lógin ásetur fleiri meginreglur við viðgerð av persónsupplýsingum. Hesar eru at finna í §§ 8-10 í persónsupplýsingarlógini.*

*Tær reglur, sum hava týdning í hesum málinum eru:*

1. *Persónsupplýsingarnar skulu bert verða savnaðar saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál.*
2. *Persónsupplýsingarnar skulu bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkja endamálið við innsavnanini, og at seinni viðgerð samsvarar hesum endamáli*
3. *Persónsupplýsingar skulu ikki verða nýttar til onnur endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki.*
4. *Persónsupplýsingar skulu verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.*

*Tey sum vera filmað, skulu vera kunnað og hava samtykt til at sjónbandaupptøkurnar fara fram. Um talan er um børn undir 15 ár, krevst samtykki frá foreldrunum. Um onnur børn enn tey við serligum tørvi eru vorðin filmað, so er tað sama galdandi fyri tey.*

*Viðv. burturbeiningini av sjónbandaupptøkunum, so er galdandi, at upptøkurnar ikki skulu verða goymdar longur enn neyðugt.*

*Dátueftirlitið varðar av persónsupplýsingarlógini, og er hetta svarið tískil skrivað eftir hesi lóg. Tað er møguligt, at tað er ein serlig lógarheimild til sjónbandaupptøkur í samband við serlig tilboð til børn við serligum tørvi. Men Dátueftirlitið hevur ikki kunnleika til eina slíka lóg."*

4.1.9. RKI SKRÁSETING

Dátueftirlitið hevur í árinum svarað nøkrum spurningum viðvíkjandi RKI, og ein kæra hevur somuleiðis verið, har ein privatpersónur metti seg verða skrásettan í RKI í stríð við reglurnar í persónsupplýsingarlógin. Dátueftirlitið tók málið upp við RKI umvegis donsku fyritøkuna, sum viðkomandi hevði gjørt lánsavtlu við, fyri at keypa vøru í føroyskum handli. Dátueftirlitið gjørdi vart við, at sambært § 9, stk, 2 í føroysku persónsupplýsingarlógini krevst samtykki frá lántakara fyri at kunna skráseta viðkomandi í RKI. Umrødda lánsavtala, sum Dátueftirlitið hevði fingið avrit av, prógvaði ikki, at eitt tílíkt samtykki var givið, og boð vóru givin um at strika upplýsingarnar um viðkomandi í RKI. Dátueftirlitið fekk seinni boð um at ongar upplýsingar um viðkomandi vóru skrásettar í RKI eftir umboð frá donsku fíggingarfyritøkuni.

4.1.10 ÆTTARBANDSSKRÁ
YVIR FÓLKIÐ Í FØROYUM

Dátueftirlitið fekk tann í 2007 eina fráboðan frá Føroya Landsskjalasavni um „gerð av ættarbandsskrá yvir fólkið í Føroyum". Ávíst samskifti var millum Dátueftirlitið og Landsskjalasavnið í hesum sambandi.

Endamálið við verkætlanini er at gera eina ættarbandsskrá til Ílegusavnið at nýta í virksemi sínum. Ílegusavnið hevur í § 3, stk. 1 og § 7 í Løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum, hereftir ílegulógin, lógarheimild at skipa, stovna og reka eina ættarbandsskrá við navnloyndum upplýsingum.

Ílegusavnið hevur av praktiskum orsøkum gjørt avtalu við Føroya Landsskjalasavn um at gera eina ættarbandsskrá fyri Ílegusavnið. Landsskjalasavnið skal sostatt „konstruera" ættarbandsskránna eftir nærri ásettum mannagongdum í avtaluni millum Landsskjalasavnið og Ílegusavnið, og skal tá skráin er liðug, lata Ílegusavninum hana í navnloyndum líki. Dátuábyrgdari av navnloyndu ættarbandsskránni er Ílegusavnið, og dátuábyrgdarin av ónavnloyndu ættarbandsskránni er Landsskjalasavnið.

Ílegusavnið, sum hevur lógarheimild í ílegulógini til at skipa, stovna og reka ættarbandsskránna, skal ikki hava viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum, men skal tó fráboða Dátueftirlitinum síni viðurskifti.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn/om Færøernes Landsarkiv, hereftir nevnd skjalasavnslógin, eru uppgávurnar hjá Landsskjalasavninum uppreksaðar.

Í hesum ítøkiliga førinum, snýr tað seg um at Landsskjalasavnið skal „konstruera" eina nýggja skrá, nevnd ættarbandsskráin, og skal hetta gerast á tann hátt, at upplýsingar úr øðrum skráum verða savnaðar í eina nýggja elektroniska skrá. Upplýsingarnar, sum verða nýttar eru bæði upplýsingar eldri enn 30 ár og upplýsingar yngri enn 30 ár.

Dátueftirlitið metir ikki, at tað at gera eina ættarbandsskrá fellur innanfyri tað vanliga virksemið

hjá Landsskjalasavninum sambært skjalasavnslógini. Landsskjalasavnið er tískil ikki fevnt av undantøkunum í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi (lógarheimild), og sostatt krevst loyvi sambært § 35 í persónsupplýsingarlógini til viðgerðina hjá Landsskjalasavninum í sambandi við gerð av ættarbandsskránni.

Upplýst varð at upplýsingarnar skulu útvegast frá:

- Ministerialbókum
- Fólkateljingum
- Landsfólkayvirlitinum

Dátueftirlitið gav við nærri ásettum treytum loyvi til verkætlanina.

4.1.11. BÍÐILISTI Á INTERNETIÐ

Dátueftirlitið hevur viðgjørt eitt mál har ein kommuna hevði ætlanir um at leggja persónsupplýsingar út á internetið, í hesum føri ein bíðilista hjá kommununi, og kommunan ynskti at fáa áskoðanina hjá Dátueftirlitinum í hesum sambandi.

Málið snúði seg í stuttum um at leggja ein ávísan bíðilista út á heimasíðuna hjá kommununi. Kommunan upplýsti, at endamálið við at leggja bíðilistan út á heimasíðuna, var partvíst fyri at vísa gjøgnumskygni í kommununi og at kommunan metti hetta vera eitt mál um meirinnlit.

Málið var viðgjørt á dáturáðsfundi, og Ráðið var ikki samt við kommununi í, at málið snúði seg um meirinnlit.

Brot úr svarinum hjá Dátueftirlitinum, „*Dátueftirlitið metir, at ein almannakunngerð av bíðilistanum á internetinum, er ein viðgerð sum er fevnd av § 3, stk. 1 í persónsupplýsingarlógini, og at málið tískil skal viðgerast eftir hesi lóg.*

*Í sambandi við omanfyri nevndu ætlan hjá kommununi metir Dátueftirlitið, at vísast kann m.a. á henda trupulleika*

- *Tá ið fólk settu seg á bíðilistan, vistu tey ikki at teirra persónsupplýsingar fóru at verða lagdar út á internetið. Tvs. at tey eru ikki kunnaði um hesa viðgerð og hava ikki samtykt til hetta.*
- *Kommunan ætlar at krevja, at øll sum eru á bíðilistanum, skulu góðtaka at verða løgd út á heimasíðuna. Tvs. at um ein borgari, sum stendur á bíðilistanum, ikki ynskir at hesar upplýsingar verða lagdar út á heimasíðuna, verður borgarin strikaður av bíðilistanum.*

*Dátueftirlitið metir hetta verða eitt mál, sum skal viðgerast eftir reglunum í kapittul 4 í persónsupplýsingarlógini. Almannakunngerð av upplýsingum á internetinum verður mett sum víðarilatan av upplýsingum, og skal tí viðgerast eftir reglunum í §§ 8-10 alt eftir, hvat slag av upplýsingum, tað snýr seg um.*

*Sum málið er upplýst fyri Dátueftirlitinum, hevur kommunan ætlanir at leggja navn, bústað og hvat nummar ein er á bíðilistanum, út á heimasíðuna, upplýst er eisini, at bústaðurin verður ikki lagdur út á internetið, um hann er duldur. Dátueftirlitið metir út frá hesum, at talan er ikki um viðgerð av viðkvæmum upplýsingum, sum krevur loyvi frá Dátueftirlitinum eftir § 10 í persónsupplýsingarlógini.*

*Tað vil siga, at í hesum føri eru tað reglurnar í §§*

8-9 í persónsupplýsingarlógini, sum metast skal um. Í § 8 í persónsupplýsingarlógini eru meginreglurnar fyri viðgerð av persónsupplýsingum ásettar. Hetta eru treytir, sum dátuábyrgdarin altíð skal lúka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Í greinini verður millum annað ásett, at persónsupplýsingar bert skulu savnast saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð skal samsvara hesum endamáli. Harafturat skulu persónsupplýsingar bert viðgerast, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkka endamálinum. Persónsupplýsingar skulu ikki verða nýttar til endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki.

Í Føroyum hevur tað ikki verið siðvenja, at myndugleikar leggja persónsupplýsingar út á internetið.

Dátueftirlitið ásannar, at skrásettir persónar í summum førum kunnu merkja, at tað verður gingið teimum sera nær, og Dátueftirlitið metir, at myndugleikar eiga at hava fyrilit fyri skrásetta og altíð viðgera persónsupplýsingar við virðing fyri einstaka borgaranum.

Skipanin, sum kommunan leggur upp til, við bíðilista á internetinum, metir Dátueftirlitið vera sera víttfevnandi, og Dátueftirlitið metir, at ein slík skipan hevur við sær, at yvirskipaðir spurningar mugu verða viðgjørdir og at neyðugt er at meta um meginregluna í § 8 í hesum sambandi. Dátueftirlitið vil tí heita á kommununa um at hugsa um aðrar møguleikar og kanna eftir, um endamálið ikki kann røkkast á ein annan hátt, enn at allur bíðilistin verður almannakunngjørdur á inernetinum.

Almannkunngerð av persónsupplýsingunum á bíðilistanum á internetinum, skal metast sum ein víðarigevan av ikki viðkvæmum persónsupplýsingum og skal sum útgangsstøði viðgerast eftir reglunum í § 9 í persónsupplýsingarlógini, har millum annað verður ásett, at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast, um tann skrásetti hevur givið sítt samtykki, um viðgerðin er heimilað í lóg, ella um viðgerðin er neyðug. Viðgerðin kann vera neyðug av ymiskum orsøkum, og eru seks ymiskar orsøkir settar upp í § 9.

Dátueftirlitið metir spurningin um at leggja bíðilistan á internetið vera eina avgerð, sum kommunan má taka. Dátueftirlitið metir somuleiðis, at kommunan, áðrenn ein so víttfevnandi almannkunngerð verður sett í verk, skal við fyriliti fyri §§ 8 og 9 í persónsupplýsingarlógini meta um endamálið við almannakunngerðini og fyrilitini fyri teim skrásettu, sum ikki kunnu setaset á ein bíðilista, uttan at hetta verður almannkunngjørt fyri – í prinsippinum – allari verðini á internetinum.

Treytin fyri at kommunan kann leggja bíðilistan út á internetið er, at kommunan lýkur allar treytirnar í § 8 og harafturat hevur eina heimild í § 9 at vísa á. Um so er, at kommunan, eftir at hava viðgjørt hesi sjónarmið gjølliga, kemur fram til, at tað er neyðugt hjá kommununi at almannkunngera upplýsingarnar á netinum, metir Dátueftirltitið seg neyvan kunna seta hesa meting hjá kommununi til viks.

Dátueftirlitið hevði somuleiðis hesar viðmerkingar um kunningarskylduna sbrt. persónsupplýsingarlógini *„Viðvíjkandi reglunum í kapittul 6 um kunning til tey skrásettu, hevur Dátueftirlitið hesa viðmerking. Fyri teir borgarar, sum ikki eru skrivaðir upp á bíðilistan enn, men sum fara at skriva seg upp í framtíðini,*

*metir Dátueftirlitið, at tað er nøktandi, at borgararnir verða væl kunnaðir um, at bíðilistin liggur á heimasíðuni. Kunningin skal gevast áðrenn ella í samband við at tey seta seg á bíðilistan. jvb. § 9 stk. 1 og § 20 stk. 1, nr. 3 í persónsupplýsingarlógini. Eitt dømi kundi verið, at kunningin er á umsóknarblaðnum til bíðilistan".*

4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM:

4.2.1. IKKI FRÁBOÐAÐ VAKMYNDATÓL (2X3)

Eitt mál, sum Dátueftirlitið hevur tikið upp av egnum ávum er ein handil í Havn, sum ikki hevði fráboðað, at vakmyndatól vóru nýtt á staðnum. Tann 30. november 2007 vóru tíðindi í tíðindasendingini hjá Kringvarpinum um, at ein persónur hevði hótt eina kvinnu við eini øks ella onkrum líknandi í handlinum 2x3 í Tórshavn. Sagt var at vakmyndatól vóru á staðnum og at løgreglan kannaði málið. Tann 3. desember 2007 sendi Dátueftirlitið 2x3 bræv, har víst var á at vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirlitinum og 2x3 var biðið um at fáa hesi viðurskifti uppá pláss. Tann 18. desember 2007 fekk Dátueftirlitið fráboðan um vakmyndatól frá 2x3 og eftir eitt ávíst samskifti fekk 2x3 tann 17. januar 2008 boð um, at fráboðanin var nøktandi.

4.2.2. INTRUM JUSTITIA

Dátueftirlitið merkti beinanvegin í árinum ein vaksandi áhuga fyri spurninginum um skráseting av upplýsingum um fíggjarlig viðurskifti hjá privatfólki, og tá so grein var at síggja í bløðunum um, hvussu nógv virksemi hjá Intrum Justitia var vaksið, gjørdi Dátueftirlitið av, at spyrja seg fyri um virksemið hjá felagnum.

Dátueftirlitið vendi sær tískil til Intrum og bað felagið greiða frá:

- hvørjar persónsupplýsingar verða viðgjørdar
- hvussu tær verða viðgjørdar,
- hvaðani upplýsingarnar verða útvegaðar frá,
- um tær verða víðarigivnar,
- og um so er til hvønn verða tær víðarigivnar

Dátueftirlitið spurdi somuleiðis um ymisku kundaskráirnar verða samkoyrdar. Í svari greiðir Intrum Dátueftirlitinum frá virkseminum hjá felagnum. Í brævinum verður somuleiðis upplýst, at felagið rekur inkassovirksemi við tað at felagið bjóðar fram eina fullfíggjaða innheintingarskipan. Svarið frá Intrum gav ikki Dátueftirlitinum høvi til at gera meira við málið.

Dátueftirlitið vendi sær tó í hesum sambandi til Løgmansskrivstovuna við fyrispurningi um, hvørt økið viðvíkjandi inkassovirksemi var mett at vera yvirtikið málsøki. Svarið frá Løgmansskrivstovuni var heft við ávísum tulkingariva, so tað var Dátueftirlitinum ógreitt, hvørt økið kundi vera mett at vera yvirktikið ella ikki, og tann 19. desember 2007 heitti Dátueftirlitið á Løgmansskrivstovuna um at virka fyri, at avvarðandi myndugleiki dagførdi lóggávuna á økinum í soljóðandi skrivi:

*„Dátueftirlitið hevur tann 19. juni 2007 sett Intrum Føroyar nakrar ítøkiligar spurningar fyri at fáa greiði á um Intrum Føroyar viðger persónsupplýsingar í samsvari við reglurnar í persónsupplýsingarlógini.*

*Í brævi, dagfest 15. august 2007, svarar Intrum Føroyar spurningunum frá Dátueftirlitinum. Í brævinum verður upplýst, at felagið rekur inkassovirksemi, við tað at felagið bjóðar fram eina fullfíggjaða innheintingarskipan.*

*Í Føroyum er støðan soleiðis, at økið viðv. inkassovirksemi er reguleráð í „lovbekendtgørelse nr. 565 af 28. august 1986 om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso- og detektivvirksomhed m.v., som sat i kraft ved lov nr. 92 af 23. februar 1988" (Vinkulskrivaralógin). Lógin er gomul og tekur ikki hædd fyri nútímans inkassovirksemi. Nevnast kann, at í Danmark er serlóggáva á økinum, sum regulerar og setur krøv til inkassovirksemi, herundir at inkassofeløg skulu hava góðkenning frá ríkisløgregluovastanum. (Lov nr. 319 af 14. mai 1997 om inkassovirksomhed)*

*Í samband við viðgerðina av hesum máli, hevur Dátueftirlitið spurt seg fyri á Løgmansskrivstovuni, um hvørt økið viðv. inkassovirksemi verður mett at verða yvirtikið málsøki. Svarið frá Løgmansskrivstovuni er heft við ávísum tulkingariva, og tí er tað Dátueftirlitinum ógreitt, hvørt økið kann verða mett at vera yvirtikið ellla ikki. Hetta er sum so ikki ein spurningur, sum hevur týdning fyri málsviðgerðina hjá Dátueftirlitinum, men tað sum er avgerandi er, at lóggávan á økinum ikki er dagførd, og at tað tí so at siga ongin lóg er, sum regulerar virksemið hjá inkassovirkjum í Føroyum.*

*Reglurnar í persónsupplýsingarlógini kunnu nýtast í samband við, hvussu inkassovirkir skulu handfara persónsupplýsingar, men regulera ikki inkassovirksemi sum so.*

*Málið hevur verið viðgjørt á Dáturáðsfundi tann 14. desember 2007, har avgjørt varð at heita á avvarðandi myndugleikar um at virka fyri, at lóggávan á økinum verður dagførd.*

*Heitt verður á Løgmansskrivstovuna um at senda hesa áheitan til rætta myndugleika."*

4.2.3. GJALDSTOVAN

Eitt annað mál, sum Dátueftirlitið tók upp av egnum ávum í 2007 var viðvíkjandi Búskaparskipan landsins. Á felags stovnsdegnum, sum var í Norðurlandahúsinum tann 6. juni 2007, kom fram, at Gjaldstovan skrásetur nýtsluna hjá einstøku brúkarunum í BSL. Dátueftirlitið sendi dagin eftir fundin Gjaldstovuni bræv, har Gjaldstovan varð biðin um at greiða frá, hvørjar persónsupplýsingar verða skrásettar og viðgjørdar í BSL, hvat endamálið við skrásetingini er, hvør hevur atgongd til upplýsingarnar og hvussu upplýsingarnar verða nýttar. Somuleiðis spurdi Dátueftirlitið Gjaldstovuna, um brúkararnir í BSL eru kunnaðir sambært reglunum í §§ 21-22 í persónsupplysingarlógini um skrásetingina, sum verður gjørd.

Eftir ávíst samskifti millum Dátueftirlitið og Gjaldstovuna boðaði Dátueftirlitið Gjaldstovuni tann 4. oktober 2007 frá, at málið hevði verið umrøtt á Dáturáðsfundi og at niðurstøðan á fundinum var, at Dáturáðið metir, at Gjaldstovan er komin væl áleiðis í arbeiðinum viðvíkjandi kt-trygd. Dáturáðið ásannar somuleiðis, at Gjaldstovan hevur eina miðvísa skipaða tilgongd á økinum til tess at betra um trygdina. Dátueftirlitið ger sostatt ikki meira við hetta málið.

# 5. Altjóða samstarv

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES fyriskipan 95/46EF frá 24.10.1995 um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu frítt flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES londini gera og á heimasíðuni hjá ES nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES lond og tey londini, sum ES nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Somuleiðis søkti Innlendismálaráðið í 2005 ES nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Arbeiðið er enn ikki liðugt, og í 2007 hevur verið samskift við ES- nevndina um spurningar, sum hava stungið seg upp hesum viðvíkjandi, umframt at Dátueftirlitið eisini hevur luttikið á fundi í Brussels.

## 5.1. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum.

Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á árligu málsviðgerafundunum millum norðurlendsku dátueftirlitini. Á hesum fundum eru framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak.

Á árliga norðurlendska málsviðgerafundinum, sum í 2007 varð hildin í Bergen luttóku umboð fyri

Dátueftirlitið. Á fundinum vóru ymisk áhugaverd evni viðgjørd, m.a. í hvønn mun arbeiðsgevarar kunnu halda eftirlit við starvsfólkum tá tey ferðast í bili, á internetinum, á fartelefonini v.m., elektronisk spor í samferðsluni, persónsupplýsingarlógin og talufrælsi og tað vaksandi antipiratvirksemi.

Dátueftirlitið metir, at tað hevur stóran týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra nógv av londunum rundanum okkum. Londini hava havt lóggávu á hesum økinum longri enn vit hava í Føroyum, og tey kenna tí oftast teir trupulleikar vit stríðast við, og kunnu vísa á ymiskar loysnir, sum tey hava nýtt.

# 6. Eftirlitsvitjanir í 2007

Dátueftirlitið hevði hvørki fíggjarliga- ella starvsfólka orku til at fara á eftirlitsvitjanir í 2007.

# Skjal 1: Reglugerð fyri Dáturáðið

Sambært § 36, stk. 4 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004 verður ásett:

**§ 1**. Í Dáturáðnum eru 3 limir, ein formaður/forkvinna, sum er løgfrøðingur og tveir aðrir limir.

**§ 2.** Ráðið viðger og tekur avgerð um:

1. Mál av serligum týdningi (prinsipiell mál).
2. Mál av stórum almennum áhuga ella sum fáa stórt árin á alment ella privat virksemi v.m.
3. Mál, sum eru ivingarsom.
4. Mál, sum ein ráðslimur vil hava ráðið at viðgera.
5. Mál, sum av øðrum orsøkum eiga at avgerast av ráðnum.

*Stk. 2.* Skrivstovan tekur avgerð í øðrum málum.
*Stk. 3.* Mál, sum eru fevnd av stk. 1, og sum ikki kunnu bíða til ráðið verður innkallað, verða avgjørd av stjóranum í samráð við ráðsformannin.
*Stk. 4.* Avgerðir tiknar sambært stk. 3 verða skjótast gjørligt lagdar fyri ráðið til kunningar.

**§ 3.** Formaðurin í ráðnum fyrireikar saman við skrivstovuni málini at leggja fyri ráðið og leiðir fundirnar í ráðnum. Skrivstovan fyrireikar fundirnar, gevur fundarboð við dagsskrá og viðleggur neyðug skjøl.

*Stk. 2.* Stjórin og onnur starvsfólk kunnu luttaka á fundum hjá ráðnum.

**§ 4.** Ráðið fundast avtalaðar dagar, og annars so ofta, sum formaðurin metir neyðugt. Formaðurin skal innkalla ráðið, tá ein limur biður um tað.

**§ 5**. Ráðið er viðtøkuført, tá formaðurin, og ein limur afturat eru til staðar.
*Stk. 2.* Avgerð verður tikin við vanligum atkvøðumeiriluta. Tá atkvøðurnar standa á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.
*Stk. 2.* Ráðið kann boðsenda serkønum, tá hetta verður mett at vera neyðugt til málsviðgerðina, eins og onnur, sum hava serligan áhuga í einum máli, kunnu fáa høvi at møta á fundi og geva frágreiðing til tess at lýsa málið betur.

**§ 6.** Um einum limi berst frá at møta á fundi í longri tíð, kann formaðurin biðja Innlendismálaráðið tilnevna annan lim ístaðin.

**§ 7.** Limur í ráðnum eigur ikki at luttaka í avgerðum ella yvirhøvur luttaka í viðgerð av máli, hvørs úrslit kann hava persónligan áhuga fyri viðkomandi, ella um viðurskifti eru, ið kunnu sáða iva um, at viðkomandi er óheftur.
*Stk. 2.* Um limur metir, at viðurskifti eru, sum møguliga kunnu verða fevnd av stk. 1, skal viðkomandi, áðrenn málið verður viðgjørt í

ráðnum, greiða formanninum frá hesum viðurskiftum.

*Stk. 3*. Ráðið tekur endaligu fyrisitingarligu avgerðina, um limurin kann luttaka í viðgerð og avgerð í málinum. Viðkomandi limur tekur ikki lut í viðgerð og avgerð av hesum spurningi.

**§ 8**. Skrivstovan skrivar fundarfrásøgn frá fundunum í ráðnum. Fundarfrásøgnin skal innihalda avgerðir og og týðandi niðurstøður, tiknar á fundinum. Fundarfrásøgnin verður góðkend á næsta fundi. Um atkvøtt verður á fundinum, verður úrslitið skrivað í fundarfrágreiðingina. Ein minniluti kann krevja sína áskoðan tilskilaða.

*Stk. 2.* Fundarfrágreiðingar frá ráðsfundum eru ikki almennar.

**§ 9**. Limirnir í ráðnum hava tagnarskyldu um teir trúnaðarupplýsingar, sum kunnleiki fæst um sum limur í Dáturáðnum og hava annars tagnarskyldu eftir vanligum reglum um tagnarskyldu galdandi innanfyri almennu umsitingina. Sama tagnarskylda er galdandi fyri starvsfólk á skrivstovuni, sum luttaka á ráðsfundum.

*Stk. 2*. Hvør einstakur ráðslimur skal ansa eftir, at tilfar sum verður fingið í sambandi við arbeiðið í ráðnum, ikki kemur óviðkomandi í hendi.

*Stk. 3*. Tá ið limur fær tilfar sendandi áðrenn ráðsfund, skal tilfarið havast við á fund og latast skrivstovuni, áðrenn farið verður av fundinum.

**§ 10.** Reglugerðin kemur í gildi 14. juni 2007. Samstundis verður reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 27. august 2002 sett úr gildi..

Dáturáðið tann 14. juni 2007

Turið Debes Hentze
Bjarni Wilhelm
Óli Hansen

# Skjal 2: Vegleiðing til vakmyndatól

HETTA EIGUR TÚ AT HUGSA UM, ÁÐRENN TÚ SETUR UPP VAKMYNDATÓL

**1.** ER VERULIGA NEYÐUGT VIÐ EFTIRLITI?
Hugsa fyrst gjølla um, hvørt tað veruliga er neyðugt at hava eftirlit við vakmyndatóli og um endamálið við eftirlitinum er sakligt.

Um eftirlitið ikki er neyðugt, er tað heldur ikki lógligt.

**2.** HEVUR TÚ HUGSAÐ UM AÐRAR MØGULEIKAR?
Hevur tú hugsað um allar aðrar møguleikar, sum t.d. meira ljós, vaktarhald ella at avmarka atgongdina til økið?

At seta vakmyndatól upp, eigur altíð at vera seinasta loysnin á einum trupulleika.

**3.** ER TAÐ LOYVT AT HAVA EFTIRLIT VIÐ ØKINUM VIÐ VAKMYNDATÓLI?
Tað er ongatíð loyvt at halda vakt við øðrum:

- Heima hjá teimum sjálvum,
- har sum mett verður, at viðkomandi er í heimligum ella privatum umstøðum, so sum í kamari á gistingarhúsi, vesi, skiftingarrúmi e.t.

Tað er bara loyvt at hava eftirlit við egnari privatari ogn, um tú harvið ikki eisini sært almenn øki ella almenna ferðslu.

Tað er ikki loyvt at hava eftirlit á støðum, har fólk vanliga rokna við diskretión, so sum hjá lækna, í venjingarhølum, svimjihallum o.t., uttan so at heilt serlig trygdaratlit tala fyri tí.

Arbeiðsgevari kann hava eftirlit við starvsfólkinum, um serlig atlit tala fyri hesum. Tað veri seg fyri at tarna revsiverdum gerðum, fyri at verja heilsu og trygd hjá starvsfólkunum e.t.

Eftirlit kann vera á sølu- og servisestøðum, um hetta er neyðugt fyri at verja seg móti ymiskum sløgum av brotsverkum.

Á útistøðum, so sum matstovum, ølstovum og náttklubbum skulu heilt serlig trygdaratlit tala fyri, at neyðugt er at hava eftirlit.

Bert almennir myndugleikar og ikki privat – hava, sum útgangsstøði, rætt til at hava eftirlit við almennum økjum, so sum vegum og opnum plássum.

**4.** KENNIR TÚ TÍNAR SKYLDUR, TÁ IÐ TÚ HEVUR EFTIRLIT?
Tú skalt boða Dátueftirlitinum frá, áðrenn tú fert undir at hava eftirlit.

Tað er ikki loyvt at hava dult eftirlit. Á sjónligum

staði skal standa, at økið er undir eftirliti og hvør, ið hevur eftirlit við økinum.

Í høvuðsheitum er ikki loyvt at lata víðari ella vísa øðrum upptøkur, uttan at tey, sum eru á myndunum, geva samtykki.

Upptøkurnar skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd, og skulu ikki goymast longur enn neyðugt. Meginreglan er, at upptøkurnar skulu strikast eftir 14 døgum.

**5.** BRÚKAR TÚ MINST VÍÐFEVNANDI HÁTT AT HAVA EFTIRLIT?

Kanst tú svara JA til omanfyri nevndu 4 punktini, so minst til at fremja eftirlitið á minst víðfevnandi hátt.

Hetta vil t.d. siga, at tú altíð skalt brúka so fá vakmyndatól sum møguligt og heldur avmynda lutir enn fólk. Av tí at slíkar upptøkur kunnu misnýtast, eiga tær í størst møguligan mun ikki at verða goymdar.

# Skjal 3: Vegleiðing um dátutrygd í sambandi við heimaarbeiðspláss

Dátueftirlitið hevur savnað ymiskar upplýsingar úr hinum norðanlondunum har víst verður á trupulleikar viðvíkjandi dátutrygd, tá talan er um heimaarbeiðspláss. Niðanfyri verður víst á krøv í lógini og fleiri viðurskifti, sum dátuábyrgdaramyndugleiki ella virki eiga at taka støðu til, tá farið verður undir heimaarbeiðspláss.

§ 31, stk. 3 í persónsupplýsingarlógini ásetur, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja, at viðgerðin av upplýsingum nøktar tær treytir lógin ásetur um trúnað, sjálvræðisrætt og innlit. Harafturat skal tryggjast, at persónsupplýsingar ikki av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar ella minka í virði, og at ikki óviðkomandi fáa kunnleika til persónsupplýsingarnar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær. Nevndu trygdarkrøv eiga at verða fylgd, bæði tá dátuábyrgdarin er almennur myndugleiki og tá talan er um privat virki o.t.

Á einum vanligum arbeiðsplássi hava starvsfólkini ofta ígjøgnum langa tíð arbeitt upp siðvenjur og mannagongdir, sum tryggja álítandi viðgerð av dáta. Tá arbeitt verður frá einum heimaarbeiðsplássi, eru siðbundnar mannagongdir ofta ikki til staðar.

Dátueftirlitið metir tað tí hava stóran týdning, at arbeiðgevarar gera leiðbeinandi reglur fyri nýtsluni av heimaarbeiðsplássum. Dátueftirlitið metir at niðanfyri nevndu trygdarspurningar eiga at havast í huga, tá arbeitt verður umvegis heimaarbeiðspláss.

**At goyma upplýsingar lokalt:**
Um neyðugt er, at heimateldan eisini skal nýtast til at goyma upplýsingar frá sentrala kervinum, er neyðugt at upplýsingarnar verða brongladar.

**At skriva út upplýsingar lokalt:**
Um neyðugt er at skriva út upplýsingar á heimatelduni, skulu leiðbeinandi reglur og vegleiðingar gerast viðvíkjandi at goyma og burturbeina útskriftir, soleiðis at óviðkomandi ikki koma at upplýsingunum.

**Onnur nýtsla av heimateldu:**
Um dátuábyrgdari loyvir aðra nýtslu, t.d. privata nýtslu, skulu vegleiðingar gerast fyri hesum og neyðug trygdartiltøk setast í verk.

**Fysisk trygd:**
Roknast kann ikki við, at fysiska trygdin móti stuldri, herverki og at óviðkomandi fáa atgongd til upplýsingar yvirhøvur eru líka so góð í heimaumhvørvinum sum á vanliga arbeiðsplássinum. Serliga tá hugsað verður um at goyma upplýsingar lokalt og skriva út lokalt mugu hesi viðurskifti vera í lagi. Harumframt kann tað vera lættari at avlurta data gjøgnum telefonlinjur í heimaumhvørvinum.

**Elektronisk trygd:**

Um sambandið millum heimaarbeiðsplássið og sentrala kervið gongur gjøgnum analogt telefonsamband, ISDN, fartelefon o.t. skal í hesum sambandi verða skipað soleiðis fyri, at óviðkomandi ikki kunnu seta seg í samband við sentrala kervið og yvirhøvur ikki koma inn í samskiftið. Dømi um tílíkar skipanir eru, at ringt verður upp aftur, vernd av loyniorði og afturlatnir brúkarabólkar. Møguligt er eisini at áseta fastar tíðir fyri, nær heimaarbeiðsplássið kann brúkast og møguliga gera eitt serligt slag av logging.

Leypandi dagføring eigur at verða gjørd av serligu vegleiðingunum fyri heimaarbeiðsplássið fyri at tryggja, at reglurnar um trygdartiltøk verða hildnar.

Dátueftirlitið, 24. august 2007.